## Bókakafé á Hafnia Lounge í desember

Jólamánaður er og nógv eru longu byrjað at stákast til jóla, men hví ikki taka eina løtu frí og koma á bókakafé saman við:

Dagny Joensen, sum fer at greiða frá um Terradropar og nýggju skaldsøguna Hvirlan. Skaldsøgan sigur frá kvinnulagnum frá undan seinna heimsbardaga og til í dag.

Vidu Akselsdóttir Højgaard, ið fer at greiða frá nýggju skaldsøguni Mørk, sum er um ungu gentuna Lív, ið longu er merkt av lívsins døkku síðu

Føroya Skúlabókagrunni, sum greiðir frá teirra útgávuvirksemi.

Vit síggjast mikukvøldið 7. desember kl. 20.00 á Hafnia lounge, sig Kunningarstovan í Havn og Hotel Hafnia, sum heilsa at øll eru hjartaliga vælkomin.

## Eingi jól uttan Leikhúsjól

**Sjónleikarhúsið í Havn er aftur í ár karmur um Leikhúsjólini, sum er vorðin fastur táttur í jólaskránni hjá Havnar Sjónleikarfelag**

LEIKHÚSJÓL 2005

Eins og mong undanfarin ár fer Havnar Sjónleikarfelag aftur í ár at seta á pall Leikhúsjól. Í fjør bar ikki til at seta upp Leikhúsjól, av tí at undirtøkan fyri Fólk og dólgum í Kardamummubýnum var so stór. Tað er tí ein gleði hjá Havnar Sjónleikarfelag at lata dyrnar upp fyri Leikhúsjólum 2005.

Leikhúsjól eru fastur táttur á jólaskránni hjá Havnar Sjónleikarfelag, og er tiltakið ein fastur partur av jólafyrireikanini - bæði hjá børnum og vaksnum. Hvør minnist ikki søgurnar um Lítla Gutta og jólastjørnuna, Nissumammu og Nissupápa og jólagávurnar, sum vórðu burtur og jólini tí øll í vanda? Ja, hjá mongum eru jólini ikki byrjað, fyri enn tey hava verið og hugt at Leikhúsjólum.

Leikhúsjól í ár taka støðið í nýliga umvælda Sjónleikarhúsinum, har loftið í salinum er tikið niður. Tríggjar mýs, sum hava búð í Sjónleikarhúsinum í mong, mong ár gerast við hesum brádliga heimleysar, og hava tær tí í kvittanum at flyta, men so...

Her skal ikki alt verða avdúkað enn, men spennandi er at vita, hvussu leikur fer...

Tað er Elin á Rógvi, sum leikstjórnar Leikhúsjól 2005.

Sýningarnar verða hesar dagar fram til 18. desember og atgongumerki fáast í Kunningarstovuni í Havn.

## Gunnar er nýggjur trummuleikari í Revival

Kultbólkurin Revival, ið seinastu tíggju árini hevur búleikast í Danmark, misti fyrr í ár trummuleikaran tá Petur Dalsgaard, ið hevur spælt við bólkinum síðan mitt í 1990'unum, flutti úr Danmark. Men maður kemur í mans stað, og valið fall nakað óvæntað á Gunnar H. Thomsen, ið best er kendur, sum bassleikarin í Týr og áðrenn tað Wolfgang.

Men Gunnar dugir eftir øllum at døma eisini at spæla trummir.

Revival vóru rættiliga virknir á tónleikapallinum í Føroyum í fyrru helvt av 90'unum, men hava seinnu árini spælt eitt sindur í Danmark, og annars til serlig tiltøk í Suðuroynni.

**nud**




# Spennandi nýggjárskonsert

**5 bólkar og eitt konsept spæla á árligu Nýggjárskonsertini, sum í ár verður hildin 2. jólakvøld, og skráin er bæði fjølbroytt og spennandi**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Árliga Nýggjárskonsertin verður 2. jólakvøld í ár. Tað er sum vænt Kyndil, ið skipar fyri konsertini, og luttakandi bólkarnir í ár eru Páll Finnur Páll, Lama sea, SIC, The Dreams og The Story Ends feat. The Message- Hetta er ein sera fjølbroytt skrá, við nøkrum av Føroya mest popputtu bólkum, og ivaleyst eisini Føroya harðasta bólki.

Her er talan um nakrar av teimum bestu yngru bólkunum í landinum, og eitt lýsingarátak. Við at taka, lýsingarátakið The Message við, tekur Nýggjárskonsertin tráin upp eftir Summar Festivalinum, ið lat Føroya Tele úlpurnar vera millum nøvnini á stóra pallinum.

Nýggjárskonsertin plagdi saman við Ólavsøkukonsertini at vera eitt tað størsta árliga tónleika tiltakið. Konsertin er enn væl dámd, men kann ikki longur rópast líka stór, nú festivalar hava millum 4-6.000 vitjandi. Profilurin hevur altíð verið kendir og royndir bólkar. Í ár er einki undantak, hóast miðalaldurin á tónleikarunum, sum spæla á hesi konsert, uttan iva er lægri enn nakrantíð áður, so er hetta heldur eitt tekin um, at ungu bólkarnir hava megnað at vunnið væl fram á føroyska tónleikapallinum heldur enn, at hetta ikki eru kendir bólkar.


*Lama Sea verður eitt festligt innslag á Nýggjárskonsertini*

# Íslendarar skapa norðurlendskan ferðavinnurisa

**Enn ein stór donsk fyritøka er farin á íslendskar hendur, nú Jyske Bravo er selt til íslendska ríkmannin Andri Ingólfsson**

FERÐAVINNA
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Fjórð størsta danska charterfelagið Jyske Bravo er selt til íslendska ferðavinnufelagið Heimsferðir. Hetta skrivar danska Ekstra Bladet.

Heimsferðir eigur longu svenska Solresor og norska Solia. Hesið feløg verða nú savnaði undir einum móðurfelagskapi og felags heiti, Nýggja felagið fer væntandi at avgreiða umleið 320.000 ferðafólk og umseta umleið eina milliard dk. kr. um árið, skrivar blaðið.

Hvørgin partur ynskir at siga nakað um prísin, men serkøn, sum Ekstra Bladet hevur tosað við, meta, at prísurin liggur um 200 milliónir.

Peder Hornshøj og Henrik Søndergaard stovnaðu Bravo Tours í 1998, og felagið er alsamt vaksið hesi árini, til at avgreiða umleið 90.000 ferðandi um árið. Hetta er teirra lívsverk, og hóast teir hava selt Bravo Tours verða teir sitandi sum stjórar og hava somuleiðis fingið ein minnið part av partapeningum í nýggja ferðavinnurisanum.

Teir siga við Ekstra Blaet, at ferðavinnu konseptið hjá felagnum eisini í framtíðini verður tað sama. Andri Ingólfsson, ið eigur meirilutan av partapeninginum í nýggja ferðavinnurisanum, leggur afturat, at Bravo Tours hava sett dagsskránna innan góðsku á danska ferðavinnumarknaðinum, og hetta konsept er fullkomi til ein norðurlendskt charterfelag.

# Danmarks Radio í kristnum ódnarveðri

**Sendingin Stormslag á DR2 hevur fingið sinnini í kók, bæði hjá katólsku kirkjuni og hyggjarafelagsskapinum KLF, Kirke og Samfund, sendingin er sambært løgfrøðingum eitt brot á rasismuparagraffina**

SJÓNVARP
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*




Veruleikasjónvarpssendingin Stormslag um tungmálmsbólkin av Amager Stormslag, ið DR2 sendur í løtuni, er eitt brot á, tí í Føroyumso nógv umrøddu, rasismuparagraffina. Hetta halda bæði løgfrøðingar, katólska kirkjan í Danmark og hyggjarafelagsskapurin KLF, Kirke og Samfund, skrivar Kristeligt Dagblad.

Hóast hetta ætlar Danmarks Radio ikki at taka sendingina av skránni, og sendi aftur sendingina fríggjakvøldið. Støðin kann tí verða meldað fyri brot á rasismuparagraffina. Sendingin fylgir gerandisdegnum hjá einum flokki av marghháttligum ungum tungmálmstónleikarum. Teir hava saman bólkin Stormslag, sum spælir myrkan og larmandi tungmálm. Í venjingarhølinum hjá bólkinum, ið eru skrýdd við alskyns satanistiskum teknum, stendur við stórum reyðum stavum "DRÆB DE KRISTNE". Tað eru hesi orð, ið hava fingið hyggjarafelagsskapin KLF, Kirke og Samfund at mótmæla beinleiðis hjá stjóranum í Danmarks Radio Kenneth Plummer, skrivar Kristeligt Dagblad.

Blaðið hevur tosað við fleiri løgfrøðingar, og hesir meta talan vera um eitt greitt brot á rasismuparagraffina, ið m.a sigur, at tú ikki mást happa ella gera mismun á fólki orsakað av teirra trúgv. Lars Peter Melchiorsen landsformaður í KLF, Kirke & Medier sigur við Kristelig Dagblad, at sendingin er eitt brot á paragraff 5 í viðtøkunum fyri Danmarks Radio, har stendur, at sendingar mugu ikki á nakran hátt skunda undir hatur orsakað av rasu, kyni, átrúna, nationaliteti ella kynsligari sannføring. Orðini "Dræb de kristne" eru ein beinleiðis áheitan.

Eisini katólska kirkjan hevur mótmælt sendingini hjá leiðsluni í DR. Í sendingini skála limirnir í Stormslag fyri at pávin er deyður. Biskoppurin í katólsku kirkjuni í Danmark skrivar m.a., at hann ikki vil seta spurnartekin við talufrælsið, men at sárandi innsløg ímóti átrúnaði sjálvdan hava nakran neyðugan boðskap, men bert gera at nógv fólk verða ill ella kedd.

Danmarks Radio tók ikki sendingina av skránni, og fríggjakvøldið, var "DRÆB DE KRISTNE" aftur á skíggjanum. Eisini upplivdu vit limirnar í Stormslag á Christiania, har teir keyptu og royktu hasj. Mikael Bertelsen, ið hevur verið framleiðslustjóri á sendingini, vísir á, at hetta er ein heilt vanlig dokumentarsending, og DR hevur ikki vilja fari inn og biðið tónleikararnar broytt sín atburð. Graffitiið á vegginum var har frammanundan, og filmliðið fór ikki at mála út yvir tað, tí hetta hevði broytt umhvørvið. Hann sigur somuleiðis, at tungmálmsbólkar altíð hava spælt við satanismu, og at í Danmark hevur man ongantíð upplivað, at hetta hevur ført til verulig álop.

Kristelig Dagblad hevur ikki fingið fatur í stjóranum í Danmarks Radio Kenneth Plummer.